# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*– Ja, tað er heilt víst, at vit fara eftir øllum trimum stigunum. Trý stig er eitt krav, tað er einki sum eitur. Tað mugu vit fáa, og vit merkja eisini trýst frá øllum síðum*

*Jón Krosslá Poulsen, VB/Sumba*

# Dia skal venja Kyndil

**Saman við Sophusi Dal-Christiansen og Hans Mikkelsen skal Dia Midjord komandi vetur royna at vinna steypið, sum Kyndil tvey ár á rað hevur vunnið í dysti móti júst Dia Midjord**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað hevur ljóðað í eina tíð, og leiðslan í Kyndli hevur eisini áður váttað, at samráðingar hava verið. Men í gjár kundi felagið so alment boðað frá, at Dia Midjord skal venja besta mansliðið hjá felagnum komandi kappingarár.

Dia spældi í drúgt áramál við Kyndli, og hann hevur eisini virkað sum venjari hjá yngri og vaksnum deildum í felagnum. Seinnu árini hevur tað tó verið í Neistanum og í VÍF, at hann hevur virkað. Og í Vestmanna kom eisini eitt gullmerki burtur úr hesum.



*Saman við Sophus Dal-Christiansen og Hans Mikkelsen skal Dia Midjord venja Kyndil komandi kappingarár*

Trý av teimum seinastu fýra árunum hava Dia og hansara menn tó verið ov stuttir móti júst Kyndli, og tí eru bestu ráðini hjá Dia kanska at fara aftur til Kyndil, um gull skal vinnast.

Og longu nú er eisini greitt, hvørjir hjálparmenninir hjá Dia verða. Sohus Dal-Christiansen hevur drúgvar royndir sum venjari innan føroyskan hondbólt, og tað verður hann, ið skal virka sum hjálparvenjari. Hartil verður Hans Mikkelsen, ítróttarlærari, eisini knýttur at venjingini. Hann skal taka sær fysiska partinum.

## Ársins spælari til Kyndil



*Finnur Hansson*

Finnur Hansson skal komandi kappingarár aftur spæla hondbólt í Kyndli. Hesum kundi felagið boðað frá, samstundis sum boðini um nýggjan venjara til felagið vórðu sent fjølmiðlunum.

Í mun til hópin, sum fyrr í vár vann FM-heitið, verða Ragnar Stakksund og Rókur Akralíð ikki við komandi vetur, tí teir fara at landinum í lestrarørindum. Og hetta er fremsta orsøkin til, at Kyndil nú aftur hevur fingið Finnur Hansson við í hópin. Finnur var eisini partur av hópinum, sum vann FM-heitið í 2004.

**-mørk**

## Barcelona eyðmýkt

Getafe stóð fyri eini sensatión av teimum heilt stóru, tá teir í gjár spældu seinnu hálvfinaluna í sponsku steypakappingini móti Barcelona. Eftir 5-2 heimasigur á Camp Nou líktist seinna hálvfinalan einum avgreiðsluspurningi, men Barcelona fekk annað at síggja. Getafe vann nevnliga dystin 4-0, og tí eru teir brádliga til reiðar at spæla finalu. Har skulu teir dystast við Sevilla, og tann dysturin verður á Bernabeu í Madrid.

**-mørk**

Áðrenn Circuit de Catalunya:

# Fýra mans kunnu vinna

**Hóast meginparturin av áskoðarunum á Circuit de Catalunya sunnudagin vónar at spaniumaðurin Fernando Alonso vinnur sponsku formil 1 koyringina, so er hann bert eitt av fýra góðum boðum uppá ein vinnara**



*Alonso koyrir sunnudagin á heimabreytini, har hann vann á fyrsta sinni í fjør*
*Mynd: polfoto*

FORMIL 1
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Eftir ein steðg í ein heilan mánað er hetta vikuskiftið aftur formil 1 koyring. Circuit de Catalunya í Barcelona verður á tremur við formil 1 fjepparum, tá ársins fyrsta formil 1 koyring í Evropa verður koyrd. Tað er neyvan nakar ivi um, at flestu fjepparanir hetta vikuskiftið fara at halda við tvífalda heimsmeistaranum, spaniumanninum Fernando Alonso. Men hóast møguleikin fyri einum sigri á heimabreytini til Alonso, so eru 3 onnur nøvn, ið hava júst somu sannlíkindi at enda á ovasta skamlinum.

### Spennandi kappingarár

Við trimum ymiskum sigursharrum í trimum teimum fyrstu formil 1 koyringunum er formil 1 árið 2007 longu sera spennandi. Ferrari legði sera væl fyri við sigri til Kimi Räikkönen í Avstralia, í Malaysia var McLaren Mercedes skjótasta liðið, tá Alonso vann koyringina, og í Bahrain var tað hin Ferrari koyrarin Felipe Massa, ið gjørdist sigursharri. Hesir tríggir kunnu allir uttan trupulleika vinna koyringina hetta vikuskiftið, men ein sigur til nýggja stjørnuskotið hjá McLaren Mercedes, Lewis Hamilton er minst líka sannlíkur. Hamilton er á einum deildum fyrsta plássi í kappingini um HM fyri formil1 koyrarar eftir eitt triðja pláss og tvey onnur pláss í teimum trimum fyrstu koyringunum.

### Mentur aero-dynamikkur

Í løtuni er støðan tann, at Alonso, Räikkönen og Hamilton hava 22 stig, meðan Massa hevur 17 stig. Tað tykist sum, um hesir fýra eru teir við bestu møguleikum at gera um seg hetta vikuskiftið og ja, hetta kappingarárið. Men tað skal ikki undirmetast, at nógv menning kann vera gjørd eftir, at ein steðgur hevur verið í kappingini í ein heilan mánað. Øll lið hava boðað frá umfatandi aerodynamiskum broytingum á bilum sínum, og júst Barcelona er ein breyt, ið setur stór krøv til aerodynamikkin.

### David Coulthard skjótastur

BMW hevur bjóðað teimum báðum oddaliðunum av í teimum trimum fyrstu koyringunum og eigur ikki at verða undirmett. Vert er eisini at halda eyga við Renault og Red Bull, ið er tvey av liðunum, ið nógv var væntað av áðrenn kappingarárið byrjaði, og sum hava sera dugnaligar sniðgevar, men sum hava klára seg sera illa í ár. Í seinastu viku vóru royndarkoyringar á Circuit de Catalunya, alla vikuna tyktist Ferrari at vera skjótasta liðið, men allar seinasta dagin gjørdi David Coulthard í Red Bull ein vørr, og setti skjótastu tíðina.

Sjónvarpið sendur formil 1 koyringina beinleiðis, sendingin byrjar klokkan 12.25 sunnudagin. TV2 Sport sendur leygardagin royndarkoyringina klokkan 11.30 og tíðarkoyringin klokkan 12.55.